Tingmenn ivast um ítróttar-veddingin fer at hava nakað avlop

Fer tann ætlaða ítróttarveddingin — tippingin — at geva ítróttinum nakað ikast. Ella fer fyrisitingin av veddingini at eta inntøkuna upp. Er spenningurin í kappingini í Føroyum nóg stórur, tí longu tíðliga kemur fram, hvussu liðini liggja fyri.

Hetta eru nakrir av teimum spurningum, sum blivu reistir, tá Tingið hósdagin viðgjørdi uppskotið hjá landsstýrinum um at seta á stovn ítróttarvedding í Føroyum. Landsstýrið hevur mett, at avlopið av eini vedding í Føroyum fer at geva ISF einar 800.000 kr. Men bæði Javnaðarflokkurin, Sjálvstýrisflokkurin og Tjóðveldisflokkurin mettu talið ov optimistiskt.

Við at gerast plága

Agnar Nielsen, úr Sambandsflokkinum, segði, at peningurin var væl undtur ítróttinum.

— Hvat er meiri áhugavert enn at siggja unglingar sýna sítt kynstur á leikvølli, segði Agnar Nielsen.

Hann hevði tó eitt men. Eftir hansara tykki var ítrótturin líka við at koma á markið — við at gerast ein plága. Hann vísti á allar kamparnar, sum eru bæði tíðliga og seint alt vikuskiftið.

Agnar Nielsen segði, at vit skulu vera varnir ikki at niðurbróta gamlar siðir, sum hava verið við at uppbyggja tjóðina.

Lítið tilfar

Atli Dam, úr Javnaðarflokkinum, mælti til at kanna inntøkuspurningin gjølla. Hann helt, at lítið tilfar var at byggja á. Hann vísti eisini á møguleikan, at undirtøkan kundi gerast so lítil, at ágóðin fór at verða etin upp av fyrisitingini.

Annars upplýsti Atli Dam, at fyrst í 70-unum kannaði landsstýrið møguleikarnar fyri einum samstarvið við Dansk Tipstjeneste, soleiðis at føroyingar skuldu fáa ein part av avlopinum, sum samsvaraði við føroyska umsetningin.

Eisini upplýsti hann, at ein slík skipan er komin í gildi í Grønlandi. Hann helt, at grønlendski ágóðin lá um 1,6 mill. kr. og metti, at føroyski ágóðin við eini slíkari skipan fer at liggja um eina millión.


Ikki politiskur meiriluti

Asbjørn Joensen, úr Sjálvstýrisflokkinum, váttaði, at hann sum landsstýrismaður kannaði møguleikarnar at luttaka í Danks Tipstjeneste. Hann segði, at málið var komið so langt, at farast kundi at tippa í 1972.

— Men, segði Asbjørn Joensen, politisk mótstøða var at fara at luttaka í danskari tipping. So ístaðin varð játtanin til ISF á figgjarlógini hækkað.

Asbjørn Joensen metti, at inntøkurnar í tí framlagda uppskotinum eru ov optimistiskar, tí munurin millum liðini teknar seg so tíðliga.

Annars helt sjálvstýrismaðurin ikki — og sipaði til Agnar Nielsen — at ítrótturin hevur verið demoraliserandi.



Tann ætlaða ítróttarveddingin skal bæði fevna um fótbolt, kappróður og veturin eisini útlendskan ítrótt. Í lotuni »tippa« nógvir føroyingar í donsku tippingini. Landsstýrið hevur mett, at føroyski umsetningurin liggur um 10.000 kr. um vikuna

Mark fyri spæli

Finnbogi Isaksen, úr Tjóðveldisflokkinum, tók undir við tankanum at stuðla ítróttinum, men hann ivaðist í, um nakað fór at verða til ítróttin.

Hann vísti á, at vit hava Happadráttin og V4, og roknaði við, at luttøkan fer at minka, tí fólk kunnu ikki bliva við at spæla.

Annars upplýsti Finnbogi Isaksen, at upprunaliga varð hildið, at Happadrátturin fór at geva landskassanum munandi inntøkur. Men hann hevur ikki givið landskassanum nógv.

— Men øvugt er við V4-spælinum, sum hevur givið útvarpinum nógv, segði Finnbogi Isaksen. Í hesum viðfangið vísti hann á, at henda ætlaða veddingin er innviklað, og krevur eina hampiliga fyrisiting, meðan V4 er lætt at umsita og krevur bert fá fólk at blaða seðlarnar ígjøgnum.

Um vinningin segði tjóðveldismaðurin, at hann verður kanska hampiligur, men ítrótturin fær ikki nógv. Sambært uppskotinum skulu 60 pst. fara til vinningar. Í V4 fara 30 pst. til vinningar.

Ítróttur góð reklama

Adolf Hansen, úr Framburðs- og fiskivinnuflokkinum, segði, at vit mugu ásanna, at ítrótturin er við at gera landið kent, og at hann er góð reklama fyri útflutningsvørurnar.

— Skulu vit nýta gott av ítróttinum, mugu vit stuðla, segði Adolf Hansen.

Hann vísti á, at luttakarnir liggja á markinum imillum sjálvi at forvinna pening og fáa frá foreldrunum, og segði, at tí liggur her ein uppgáva hjá tí almenna.

Í verandi landsstýrissamgongu er ikki meiriluti at luttaka í donsku tippingini. Hetta upplýsti Torbjørn Poulsen, landsstýrismaður.

Hann segði, at uppskotið er í tráð við ynskini hjá ítróttinum, sum hevur ynskt málið reist. Torbjørn Poulsen metti, at ítrótturin kann fáa eitt ikast.

jo-mo

Ikki bygdamenning ivð skattafrádráttum — heldur beinleiðis íkast

Arbeiði má skapast úti á bygdunum, soleiðis at fólkið kann støðast. Hetta eru flest allir politikkarar samdir um. Men hvussu kann hesin spurningurin loysast. Er uppskotið hjá Tjóðveldisflokkinum ein gongd leið — ella fer okkurt upp aftur betri at spyrjast burtur úr uppskotinum?

Tjóðveldisflokkurin hevur lagt eitt bygdamenningaruppskot fyri Tingið. Sambært uppskotinum, skulu fólk, sum seta pening í virki í tilafturskomnum bygdum, fáa loyvi at draga í mesta lagi 10.000 kr. frá í skatti. Somuleiðis skal tað vera landskassanum heimilað at seta upp til 20 pst. í parta-ella lutapeningi.

Fyri uppskotsstillaran segði Erlendur Patursson, at tað hevur verið trupult at finna fram til, hvat er ein tilafturskomin bygd og hvør er ikki. Tí hevur Tjóðveldisflokkurin valt, at Idnaðarstovan og Menningargrunnurin skulu gera eitt yvirlit yvir tær bygdir, sum kunnu koma upp á tal.

Hann vísti á, at fólk hevur hópað seg saman á summum plássum, meðan fólkið í øðrum bygdum er minkað. Erlendur Patursson segði, at tað at bygdirnar minka, má vera høvuðskriteriið fyri eina tilafturskomna bygd.

Erlendur Patursson vísti eisini á tað, sum er gjørt fyri at gera tað livligari á bygd: gott vegasamband, telefon, øktur heimaútróður, útvarp og sjónvarp, møguleikar fyri bygdahúsum, bøtt Strandferðsla o.s.fr.

Sovibygdir

— Men vit hava fingið nakrar sovibygdir. Fólk arbeiða aðrastaðir enn tey búgva. Hetta er ikki ein góð loysn. Vinnan má vera har, ið fólkið býr, segði framsøgumaður Tjóðveldisflokksins.

Asbjørn Joensen, úr Sjálvstýrisflokkinum, helt tað vera rætt at seta inn á bygdunum, haðani fólkið flytir. Hann roknaði tó ikki við, at tað slepst undan sovibygdum.

Hann saknaði upplýsingar um, hvat tørvur er á, og hvat er lønandi at gera iløgur í. Hann kundi tí hugsa sær, at menn fingu sett á blað, hvat menn kundu hugsa sær at stovna og hvar tað skal vera.

Jógvan Sundstein vísti á, at samstundis sum nógv útbygging er farin fram, soleiðis at bústaðarmøguleikarnir eru betri, er stórur tørvur á arbeiðsplássum.

Framsøgumaður Fólkafloksins helt tað vera ein góðan tanka, at iløgan skal kunna dragast frá, men metti tað vera trupult at skilja bygdir út.

Adolf Hansen, úr Framburðs- og Fiskivinnuflokkinum, dámdi ikki tankan at býta bygdir upp í klassar — u-bygdir og ikki — u-bygdir. Hann mælti tí til at gera uppskotið generelt.

Ikki skatta-frádráttir

Atli Dam, úr Javnaðarflokkinum, helt tankan at fremja bygdamenning vera positivan, men metti tað vera torført í praksiss, tá lóggávan ikki er generell.

Annars segði hann, at honum dámdi ikki at brúka skattaskipanina til frádráttir. Og vísti á, at roynt hevur verið at fáa flest møguligar frádráttir burtur úr skattaskipanini.

Ístaðin mælti Atli Dam til at brúka minni pening til álíkningina og meiri í beinleiðis íkasti til vinnuna.

Finnbogi Isaksen, sum segði seg vera stórt sæð samdan við uppskotið, var eisini betonkiligur við at fara at skapa partsreiðarlir á landi.

Hann segði, at hann mangan hevði mælt til at avtaka alla avskrivingarlóggávu og ístaðin mælt til, at tað almenna luttók í størri mun.

Annars helt Finnbogi Isaksen tað vera torført at býta bygdir upp. Hann segði, at stórplássini kunnu ikki koma upp á tal, men hann legði afturat, at einki forðar t.d. einum klaksvíkingi at seta í eitt virki á einum smáplássi.

Figgjarnevndin skal nú viðgera uppskotið.

jo-mo